## Tíðindi frá Amnesty International:



# Alheims kvinnudagur: Tóm orð og svikin lyfti

Ein 11 ára gomul genta, NJ, frá eini innlendis flóttafólkalegu í útjaðaranum í Khartoum í Sudan, bleiv burtur 5. mai 1999, tá hon skuldi koma aftur av vitjan hjá foreldrum sínum í eini grannalegu. Hon varð hildin at vera eitt landastrok og sett inn á løgreglustøðina, og har varð hon neyðtikin av einum yvirmanni, meðan tríggir aðrir hugdu at. Sjálvt um læknalig prógv vóru fyri, at NJ var neyðtikin, bera fólk álvarsligan ótta fyri, at hennara søk ikki fer at koma fyri rættin.

Støðan hjá kvinnum og gentum um allan heim líður undir sterkari mótsøgn til vælvalgdu orðini í alheimssamskiftinum, sigur Amnesty International í dag, alheims kvinnudagin.

Hóast lyftini og kunngerðirnar, sum gjørdar vórðu fyri fimm árum síðani á fjórðu alheims ráðstevnuni um kvinnurættindi í Beijing, hevur sera lítil framgongd verið útinnt av stjórnunum fyri at verja kvinnurættindini frá eini ørgrynnu av mannarættindarligum brotum, sum verða framd av kynsligum orsøkum, sigur Amnesty International.

Framhaldandi miseydnaðu royndirnar at verja kvinnurættindini vísa skortandi politiskan vilja veruliga at gera broytingar í lívinum hjá kvinnum.

Tað er vanligt, at stjórnir gloyma síni lyfti og sínar avtalur, ið gjørdar eru á alheims pallinum, og seta meinbogar í vegin fyri at verja rættindini hjá kvinnuni við at draga mentunarligar og átrúnarligar áhugar upp í málið.

Fleiri kvinnur og gentur doyggja dagliga orsaka av ymiskum hættum fyri kynsligum ágangi enn av nøkrum øðrum broti á mannarættindini. Hvørt ár verða eitt ótal av kvinnum og ungum gentum meisladar, bukaðar til deyðis, brendar livandi, neyðtiknar ella seldar til kynslig endamál, fyrst og fremst tí tær eru kvinnur.

Kvinnur verða framvegis viðgjørdar sum annað klassa borgarar í fleiri pørtum av heiminum, og tær verða útsettar fyri diskriminerandi lógum og gerðum, ofta av átrúnaði, siðvenju ella mentan. Í Pakistan t.d, verða hundraðtals kvinnur dripnar í heiðurinnar navni um árið, og hóast slíkar gerðir eru ólógligar, verða tær framdar framhaldandi orsaka av líkasælu og kynsligum fordómum hjá pakistanskum myndugleikum. Í øðrum londum verða kvinnur umskorðnar undir tvingsli, hóast hetta er ímóti lógum landsins.

Ábyrgdina fyri hesum ágangi hava stjórnirnar, um tær regluliga onki gera fyri, at draga áleypararnar í rættin, og misrøkja teirra skyldur at verja kvinnur móti slíkum ágangi, leggur felagskapurin áherðslu á.

Kvinnur eru serliga í vanda í økjum, har vápnaðar ósemjur valda. T.d. kann nevnast, at kvinnur og ungar gentur eru í serligum vanda, tá tær eru flóttarfólk, hóast ta serliga eru tær, ið skulu taka sær av teimum ungu, sjúku og eldri í ókenda og fíggindaliga sinnaða umhvørvinum. Tíverri hendir tað seg alt ov ofta, at hesar kvinnur verða neytiknar, ella annar kynsligur ágangur verður framdur ímoti teimum við landamørk og í flóttarfólkalegum.

# Turkaland

*Ungar kvinnur neyðtiknar og kynsliga misnýttar í varðhaldi*

Tveir ymsar dagar tíðliga í mars 1999 vórðu tvær ungar kurdiskar - 16 ára gamla lesandi studenturin N.C.S og 19 ára gamli studenturin Fatma Deniz Polattaç - handtiknar av løgreglumyndugleik-unum og settar í varðhald í deildini móti yvirgangi á løgreglumiðstøðini í Iskenderun í Turkalandi í ávíkavist fimm og sjey dagar. Ungu kvinnurnar søgdu, at tær vórðu píndar og noyddar at geva ósannan vitnisburð, meðan tær vóru í varðhaldi hjá løgregluni.

Sambært frásøgnunum hjá kvinnunum vóru tær bæði neyðtiknar og útsettar fyri kynsligum yvirgangi. Tær høvdu allatíðina í varðhaldinum bind fyri eyguni. Teir fyrstu tveir dagarnar varð N.C.S. noydd at standa uppi alla tíðina, forða at sova ella nýta vatnhúsið og nokta mat og drekka við undantaki av súrari mjólk. Hon varð noydd at lata seg úr klæðunum og standa nakin í einum køldum rúmi. Meðan avhoyringarnar fóru fram, varð hon sligin um allan kroppin - við sløgum beinleiðis í høvdið, kynslutirnar, afturpartin og bróstini - og noydd at sita á einum vátum gólvi í langa tíð, áðrenn hon varð rullað nakin í vatni. Hon var eisini hongd upp eftir ørmunum og undirdíkt við køldum vatni undir pressi. Hon varð hótt við at verða dripin, og at mamma hennara fór at verða neyðtikin.

Fatma Deniz Polattaç varð sambært frásøgnum úti fyri somu píningum sum N.C.S. Hon varð eisini hótt við, at bæði pápi og mamma hennara fóru at verða neyðtikin, meðan hon hugdi at, og at pápi hennara fór at missa starv sítt. Tað einu ferðina varð hon sligin so í andlitið, at ein av tonnum hennara brotnaði. Seinni varð hon eisini neyðtikin:

*"Ein løgreglumaður bað meg lata meg úr trussum og sokkum. Eg var ræðslusligin og gjørdi, sum hann segði. Eg varð standandi. Ein løgreglumaður í búna bað meg boyggja meg framyvir. Síðani trýsti hann okkurt inn í meg aftanífrá. Tað var okkurt langt og sagtakkut. Tá fór eg at bløða. Eg var boygd heilt framyvir, men teir slóu meg við stavum teirra, meðan teir góvu mær boð um at rætta meg upp."*

Aftaná hesa hending helt ein av løgreglumonnunum, sum var við til píningina, á við at siga henni, "sjálvt um tú fer til lækna, kanst tú einki prógva." Í roynd og veru vórðu kvinnurnar kannaðar bæði við byrjan og endan av varðhaldinum av fimm ymiskum myndugleikasettum læknum, íroknað kvinnulæknum 6., 9. og 12. mars. Ongin av hesum læknum sá nakað tekin um harðskap, sjálvt um, - virkandi eftir samtykki frá foreldrunum hjá báðum kvinnunum - læknin framdi "moyar-royndir". Men ein moyarroynd (kannan av moyarhindini) kann ikki prógva um ein neyðtøka er framd ella ikki, tá neyðtøkur kunnu fremjast uttan at moyarhindin nýtist at skrædna. Harafturat hevði óheftað turkiska læknafelagið (TMA) í 1992 staðfest, at moyarroynd var eitt slag av kynsligur yvirgangi og niðurgerð av kvinnukynsliga samleikanum. Royndin kundi hava skelkandi árin. Í januar 1999 sendi løgmálaráðið út eina kunngerð til landsins ákærar, har moyarroyndir verða bannaðar, tá eingin illgruni er um kynsligan yvirgang. Amnesty International hevur ta áskoðan, at er ein vitleysur háttur av kynsligum ágangi við valdi at fremja hesar royndir á kvinnuligum fangum. Hetta kann bert samanberast við píning og harða, ómenniskliga og eyðmýkjandi viðgerð.

12. mars vórðu báðar kvinnurnar aftur sendar í fongsul av trygdarrættinum í Adana, skuldsettar fyri at vera limir í vápnaða mótstøðubólkinum Kurdistan Workers' Party (PKK) og fyri at hava verið uppi í einum molotovcocktail álopi undir eini mótmælisgongu. 2. november 1999 varð Fatma Deniz Polatta dømd 18 ára fongsulsrevsing. N.C.S. varð dømd í 12 ára fongsul, ein minni revsing orsakað av aldrinum. Báðar kvinnurnar halda uppá, at ákærurnar eru bygdar á frásagnir givnar undir píning. Hóast hetta verða tær sitandi í fongsli og bíða eftir eini avgerð frá kæridómstólinum.

Í juli 1999 fingu fýra læknar fra TMA loyvi at vitja ungu kvinnurnar í fongslinum. Teir fingu loyvi at tosa við tær, men ikki til at kanna tær likamliga. Sambært læknafrágreiðingini styðjaðu sjúkraeyðkennini frásagnirnar hjá báðum kvinnunum um píning.

TMA slóg fast at allar almennu læknafrágreiðingarnar, sum myndugleikasettu læknarnir høvdu gjørt, ikki kundi nýtast av turkiska heilsumálaráðnum ella TMA sum løgfrøðisligar frásagnir. TMA undirstrikaði týdningin av røttum læknaligum kanningum, íroknað sálarligum kanningum, sum skjalprógv fyri pástandum um píning. Felagsskapurin eftirlýsti slíkum kanningum at verða framdar við frásøgnunum hjá báðum kvinnunum um píning í huga. Løgfrøðingarnir hjá báðum kvinnunum bóðu eisini um, at tær vóru sendar til serligar sálarfrøðisligar deildir fyri at verða kannaðar fyri áhaldandi skelk og fyri at tryggja, at tær fingu røttu læknaligu viðgerðina, men enn hava ungu kvinnurnar ikki fingið atgongd til lívsneyðugu medisinsku og sálarligu røktina. Myndugleikasettu læknarnir eru eisini ákærdir fyri at hava skrivað læknafrágreiðingar, ið dylja píning.

Aftaná eitt neyðarróp og eina formliga klagu frá løgfrøðingunum hjá kvinnunum 9. novemer, byrjaði almenni ákærin eina kanning av pínuákærunum móti løgreglumonnunum. Hóast fýra læknar frá Adana Forensic Institute kannaðu báðar kvinnurnar 27. november og váttaðu, at tær høvdu verið píndar, sá høvuðsákærin í Iskenderun burtur frá teimum. Hann avgjørdi ikki at revsa løgreglu-menninar.

Tey seinastu árini hevur Amnesty International staðfest fleiri hendingar við neyðtøku og kynsligum yvirgangi framdar av limum á trygdardeildini í Turkalandi. Royndir hjá N.C.S. og Fatmu Deniz Polattaç vísa framhaldandi píning av børnum og kvinnum á turkiskum løgreglustøðum og fongslum. Í avbyrgdum varðhaldi hjá løgregluni verða bæði menn og kvinnur vanliga úrlatin. Píningarhættir, sum Amnesty International fær at vita um, eru elektriskir stoytir og buking beinleiðis á kynslutirnar og á kvinnubróst, kynslig eyðmýking, íroknað neyðtøku og neyðtøku-hóttanir. Síðani miðskeiðis í 1997 hava hjálparbólkar í Istanbul roynt at fingi gerningsmenninar fyri rættin fyri at hjálpa kvinnum, sum hava verið neyðtiknar ella hava verið fyri øðrum kynsligum ágangi av løgreglumonnum og øðrum. Um 100 kvinnur, meira enn 80 av teimum kurdar, hava styðjað ætlanini. Umleið 40 teirra siga frá neyðtøku og 65 frá øðrum kynsligum ágangi. Mistonktu gerningsmenninir eru fyri tað mesta løgreglumenn, men eisini hermenn og býarvaktir eru undir illgruna. Teir fara tó neyvan at ábyrgdast fyri teirra misgerðir.

Hvat kanst tú gera?

Skrivað til turkisku myndugleikarnar, og minn teir á málini við Fatma Deniz Polattaç og N.C.S., vís á, at tú ber otta fyri, at tær verða píndar og misnyttar, vís á, at turkisku myndugleikarnir alt fyri eitt eiga at taka stig til, at verja kvinnur og gentur í varðhaldi, so tær ikki vera fyri liknandi ágangi, og minn turkisku myndugleikarnar á, at teir í 1988 staðfestu the Convention Against Torture hja ST. Skrivast kann til hesar adressur (Tað ber væl til at skriva longri enn víst í døminum):

Løgmálaráðharran:

Professor Hikmet Sami Türk
Minister of Justice
Adalet Bakani
Adalet Bakanligi
06659 Ankara, Turkey

Kvinnu- og barnamálaráðharran:

Mr. Hasan Gemici
State Minister responsible for women and children
Office of the Prime Minister
Basbakanlik
06573 Ankara,Turkey

Brævadømi:

I am very concerned to hear reports of minors being held in prison and tortured in Turkey. I am refering to the two young girls N.C.S. Fatma Deniz Pollattaç who were arrested by police authorities and detained at the Anti-Terror Branch of police headquarters in Iskenderun for seven and five days respectively in early March 1999.

I must express my concerns that the torture and sexual abuse they suffered whilst under police custody are gross violations of their human rights, and also express the urgent need for the Turkish authorities to take measures to prevent girls and women in custody from being subjected to torture and ill-treatment and remind the Turkish authorities of their obligations under the UN Convention Against Torture, which Turkey ratified in 1988.

*Yours sincerely*



## Ítróttur

e-mail: jakup@sosialurin.fo
Sosialurin - Box 76 - 110 Tórshavn - Tlf. 31 18 20 - Fax 31 47 20

ÍtróttaSosialurin kann sjálvandi eisini lesast á alnetinum: www.sosialurin.fo

# VÍF heldur fast um oddasessin

*VÍF tryggjaði sær tvey týdningarmikil stig, tá Kyndil sunnudagin kom á vitjan. Við sigrinum eru vestmenningar framvegis á odda í landskappingini*



*Rógvi Nielsen er nú aftur at síggja á VÍF liðnum, og tað er einki at ivast í, at hetta er teimum ein kærkomin styrkur, nú seinastu og avgerandi dystirnir hetta kappingarárið standa fyri framman*

*Mynd: Álvur Haraldsen*

JÁKUP MØRK

VÍF-Kyndil 28-26 (11-14)

Hóast tað bert var annað liðið, sum hevði føroyameistaraheitið at spæla fyri, so var spenningurin undan dystinum sunnudagin stórur.

VÍF hevur stóran part av kappingarárinum verið á odda í bestu mansdeildini, og hóast tað ikki hevur gingist Kyndli eins væl, so hava teir fleiri ferðir prógvað, at einki av oddaliðunum skal vænta sær ein lættan dyst, tá Kyndil er mótstøðuliðið.

### Eingin lættur dystur

Tað gjørdist eisini rættuliga tíðliga greitt, at VÍF so avgjørt ikki skuldi vænta sær nakran lættan dyst sunnudagin, tí so at siga allan fyrra hálvleik var tað Kyndil, sum hevði leiðsluna.

Rættuliga tíðliga gjørdu teir av at mansverja Inga Olsen, og hetta darvaði spælinum hjá heimaliðinum rættuliga nógv. Harumframt stóð Lars Winther sera væl í málinum, har hann fleiri ferðir bjargaði, tá vestmenningar høvdu leikt seg ígjøgnum verjuna.

Eitt skifti var Kyndil eisini á odda við fimm málum, men stutt fyri steðgin megnaði VÍF at minkað um munin.

Merkisvert er annars, at Rógvi Nielsen nú rættuliga tykist vera komin fyri seg, eftir at hann meginpartin av árinum hevur verið úti við skaða. Einki er at ivast í, at vestmenningar eru sera fegnir um hetta, og tað var eisini sjónligt, at hetta gjørdi góðan mun hjá vestmenningunum.

### VÍF kom í gongd

Seinna umfarið byrjaðu teir, har teir sleptur fyri steðgin, og støðugt minkaðu teir um munin. Onkursvegna hevði Kyndil nú slept mansverjuni av Inga, og hetta gjørdi helst eisini sítt til, at spælið hjá vestmenningum nú riggaði betur.

Skotroyndirnar vóru nú eisini neyvari, soleiðis at Lars ikki fekk fatur á eins nógvum, og tá hálvleikurin var hálvrunnin, hevði tað eydnast vestmenningum at vunnið seg fram um kyndilsliðið.

Kyndilsliðið tóktist eisini vera darvað av, at vestmenningarnir nú mansvardu spælskiparan, Jacob Jónsson. Í øllum førum gekk spæl teirra als ikki eins væl, og tað hevði gjørt í fyrra hálvleiki.

Einasti kyndilsleikari, sum veruliga gjørdi um seg hesa løtuna, var Hans Áki, tá hann ferð eftir ferð breyt ígjøgnum frá veinginum.

Kyndil fekk tó so við og við betur tak á spælið, men kortini megnaðu vestmenningar alla tíðina at halda seg framman fyri.

Tá fimm minuttir vóru eftir at leika, øktu vestmenningar upp í trý mál, men tá Sámal løtu seinni varð útvístur, megnaðu kyndilsmenninir at minkað munin niður í eitt mál.

Seinasta orðið var tó ikki sagt, og við seinasta málinum í dystinum, kundi Agnar Joensen tryggja vestmenningum sigurin.

### Manglaðu tað síðsta

Kanska var munurin á liðunum báðum tann, at Kyndil sum so einki hevði at spæla fyri, at teir tískil ikki góvu seg tað lítla petti eyka, sum ofta er avgerandi fyri slíkar dystir.

Ikki tí, dysturin millum hesi bæði liðini er jú stóri klassikarin í føroyskum hondbólti, og tað er einki at ivast í, at kyndilsleikararnir heldur enn gjarna vildu vinna dystin. Tað er tó munur á, tá annað liðið hevur FM-heitið at berjast fyri, meðan hitt bert stríðist fyri æruni.

Vestmenningar hava nú tveir dystir eftir, og við sigrinum sunnudagin, kunnu teir framhaldandi sjálvir gera av, um tað skal eydnast teimum at vinna FM-heitið aftur. Taln er tó als ikki um nakrar lættar dystir, sum teir hava eftir, tí talan er um hinar báðar biðlarnar, StÍF og Neistan.

Hvussu hesir dystir fara at spæla av, er sjálvsagt ilt at siga, men roknast kann við, at tað verður dagsformurin og teir væl kendu smáu mariginalarnir, sum fara at gera av, hvør kann kalla seg føroyameistara komandi árið.

Sum nevnt, so hevur Kyndil nú bert æruna at spæla fyri, men væntast kann tó, at eisini teir hava nakað at siga, tá avgerðin skal fella um FM-heitið. Seinasta leikumfar skulu teir á útivølli royna seg móti StÍF, og møguliga eru strandingar tá framvegis partur í gullstríðnum.

Seinasta ár fall avgerðin um FM-heitið í júst hesum dysti, og soleiðis kann eisini gerast í ár.

### Dysturin í tølum

**Málskjúttar:**
VÍF: Sámal Joensen 7 (1), Agnar Joensen 6 (1), Ingi Olsen 5 (2), Johnny Joensen 4, Harald Bjørgvin 3, Rógvi Nielsen 2, Martin Hummeland 1
Kyndil: Jacob Jónsson 8 (5), Hans Áki Dahl Christiansen 7, Rúni Poulsen 4, Bjarni Wardum 4, Janus Einar Sørensen 2, Regin M. Petersen 1
**Brotskøst:**
VÍF 7, Kyndil 7
**Útvísingar:**
VÍF 3, Kyndil 3
**Dómarar úr Neistanum:**
Hjalmar Petersen og Kristian Johansen



*Toppskjúttarnir báðir, Sámal og Jacob*

*Mynd: Álvur Haraldsen*